# Nøvn

# Ólavur Hátún 80 ár



So spelkin hann er, maestro, Ólavur Hátún. Enn svingar hann armarnar og fær ljómin í tónleikinum av Bach at rumsast í okkara verð - Der Geist hilft unsrer Schwachheit auf og Magnificat, sum ljómaðu undir bitunum í Vesturkirkjuni og í Fuglafjarðar kirkju í fjør upp undir jólaføstuna. Har var ikki eiti av frummmegi í hesum kroppi at fáa so stór kórverk upp at standa. Hetta hevur verið hansara hjartamál í ár so mong at birta upp undir kórsangin her á klettunum bæði á bygd og í bý, og at syngja kórverk, sum ikki áður hava verið sungin her á landi. Hetta hevur gagnað føroyska kór – og tónleikalívinum og okkara mentan, so neistin av hesum degi er góður førningur at hava við sær í kórskjáttuni bæði dag og nátt.

### Í Herlufsa stovu

Ólavur hevur frá heilt ungum árum av sæð openberingina í tónlistini, ein frumgróður, sum hevur gagnað so mongum til so mikla gleði, at bara Várharra veit um hetta at siga. Kanska veit Várharra heldur ikki alt, ella hann sigur; Sumt lati eg fara aftur við borðinum. Tí teldustýrda medvit hansara goymir at so mongum, at hann má velja og vraka á tí guddómsrikna harddiskinum; men kanska er tað so, at tað, sum ikki verður goymt, at tað er júst tað, sum ongantíð verður gloymt.... og her hava vit mannin í ungdómsins blóma standandi upp við klaverið í Herlufsa stovu í Fuglafjarðar skúla einaferð fyrst í fimmti árunum - 1952/53. Tá gekk eg í 3. flokki. Hann lærdi okkum at syngja: Viva la Musika. Hetta var hugtakandi ljómur fyri tystandi barnasálir á bygd, sum elskaðu sang. Tað stuttligа við hesum var, at Tummas N. Djurhuus var eisini vikarur fyri Herluf eina stutta tíð, og hann lærdi okkum at syngja: Ach du lieber Augustin. Ja, eingin ánaði, at hesir knevlar skuldu koma at fáa so stóran týdning fyri okkara mentanarlív. Kanska var tað tí, at teir báðir høvdu staðið uppi við klaverið í Herlufsa stovu og sungið og kent andan úr hesi sáttmálaark av einum runnakendum, kosmiskum anda, sum teir goymdu í sínari mentanarskjáttu, sum fylgdi teimum restina av lívinum. Spell var at Tummas doyði so brádliga bert 43 ára gamal 1971.

### Uppvøkstur: Svínoy

Ólavur er føddur í Svínoy 17. febr. 1931 og var her til hann var sjey ára gamal. Hjalmar Hátún varð settur lærari í Svínoy 1923 og var lærari her til 1938. So mangan Ólvaur rør aftur á tíðina úti í Svínoy. Her var eitt livandi bygdarsamfelag við fólki, sum hevði sín uppruna í rótføroyskari mentan, og løgið kundi tað tykjast, tá ið klaverið eftir búgvi hjá abba Ólavs, Poul á Heygum, kom til Svínoyar. Hetta var einasta klaver eystan fyri Múla. Tað kom við postbátinum, Streymi, til bygdina - varð lossað og sett niður í eitt áttamannafar og so siglt inn á lendingina. Hetta minnist Ólavur, sum sat framman fyri gluggan heima við hús og sá hesa sjón. Aftur var tað klaverið, sum fekk hugan at flyta seg. Hjalmar Hátún hevði longu tá kór í bygdini, og mundi hetta óivað vera eitt tað fyrsta kórið á bygd, sum sá dagsins ljós her á landi. Kórið sang t. d. Mellom bakker og berg( Nordmannen), sum kanska var fyrsta lag, ið Ólavur við sínum smáu fingrum trilvaði seg fram til á klaverinum. Nevnast kunnu sangarar sum Hans David Jacobsen, lærari, faðir Flóvin Jacobsen, sum spældi harmoniku. Hann hevði sera gott mál, Líggjas á Váli sang eisini við hesum kóri og Erling hjá Jóa. Hetta vóru ófførir bassar, sum rungaðu ímillum inn – og útsúð í brimgangi, men eisini eins mildir sum lygnir á sjónum, tá ið teir skuldu sameinast við kvinnurøddirnar.

Hjalmar Hátún sang eisini við børnunum, so ikki kann annað sigast, enn at Ólavur hevur fingið mangt og mikið inn við móðurmjólkini og ikki at forgloyma bátasmiðin, Pól Johannes, sonur Poul í Nornastovu úr Mikladali. Hann er ein ímynd hjá Ólavi, sum pápin fekk gott av í allar mátar, tá ið tað snúði seg um bátasmíð. Hjalmar hjálpti Poul at smíða bátar, og var Poul ein tann dyggasti bátasmiður her á landi. Ólavur hevur gingið í knæsbótum faðir síns, fingið bátamíð og angan av hølvisspónum í sinnið. Ólavur og báturin hava verið sum stúkan og rekkjuváðin síðani, og hevði hann longu her sæð, hvussu ein bátur varð strektur, reistur, flaktur og laðaður. Alt hetta hevur verið gáva til gagns og ein góð lunnbót hjá Ólavi at hava sum førning. Grammofon var eisini í húsinum, og Hjalmar spældi eisini violin, sum hevur lagt eina ál afturat tí musikalska renslinum. Móðir Ólavs fór niður á Kunst og Husflidskolen í Keypmannahavn 1933, so sigast kann, at henda modernaða lærarafamiljan í Svínoy hevur verið sera virkin á sín hátt, og hevur tíð teirra í Svínoy verið mennandi bæði fyri Svínoyar bygd og tey sjálvi. 1938 bleiv Hjalmar lærari í Kvívík, og búði tey her til 1946.

### Kvívík

Tað lá frammarlaga í sinninum hjá Hjalmari, at leggja lunnar undir kór. Soleiðis bleiv eisini, tá ið komið varð til Kvívíkar. Tey búðu í skúlanum, og var kamarið hjá Ólavi móti skúlastovuni, so hann hoyrdi, tá ið pápin mykti røddirnar um kvøldarnar á kvívíkingum. Hetta festi seg í oyrað, og lærdi hann allar "stemmurnar". Tað gav at bíta einum sinni, tað galt okkara tjóðsang. Faðirin hevði fingið ein íslending at útseta lagið fyri blandað kór, men hevði króksett lagið. Hann fann tað ikki aftur. Ólavur hjálpti pápa sínum at leggja á aftur kíkin, tí hann hevði hoyrt hetta so ofta úti undir væðingini í Kvívík, og hevði hetta fest seg so í hugan, at hann kundi lata av hesum ljómi úr sínum barnasinni. Soleiðis komu teir heilskapaðir úr hesari løgnu støðu, og glaður var pápin, at hann uppdagaði, at sonurin eisini hevði tóna.

Ja, nú sæst í sjónvarpinum um kór, sum verða reist næstan úr ongum, har t. d. danir, ja, og bretar við, fara út á gøtuna og biðja vanlig fólk koma at syngja. Tað var júst tað, sum Hjalmar gjørdi bæði í Svínoy og í Kvívík, og sum mangir við honum her á landi hava gjørt. Ja, so er tað tilfarið, sum tú arbeiðir við. Tað er sum at byggja ein bát, at strekkja kjølin, reisa, flekja og laða, so er báturin har .. ja, so stendur kórið har í øllum sínum skrúð og gevur ljóð. Spurningurin er, um tey skapandi evnini, sum eru løgd niður í okkum koma til sín rætt. Hjá Hjalmari komu tey, sjálvt á eini útoyggj langt úti í Atlantshavinum, og hetta flutti seg yvir á sonin, sum tók henda tátt upp, og væl er komið burturúr.

Nú er so nógv sagt um Hjalmar og hansara áhuga fyri tónleiki, men mamman, Brynhild, var ikki sør. Hon var ættað ú Vestmanna.Tey møttust í Vestmanna. Hjalmar var á veg oman í dans, og møttust tey í Heygabrekkuni, ella har um vegir, og fóru tey inn á gólvið hjá Hildu fastir og Petur á Heygum, morbróðrinum. Faðir tók violinina fram og fór at spæla. Brynhild segði, at hetta var so dárandi, at tað fleyt yvir við heitum og eymum kenslum. Hjalmar spældi seg inn í hennara innasta krók og setti eld í sálina við eini violin. Ja, hann var longu tá knávur at spæla. Hetta var teirra yndiskvøld í ungmanna kæti og kærleikans róma. Betri kann tað ikki verða, tá ið tónarnir opna sinnið og fáa kenslurnar at liva..... sum eisini vórðu lagdar niður í sonin.

### Havnin

1946 flutti familjan til til Havnar. Hjalmar var lærari í Kvívík til 1948 og fekk so starv í Kommunuskúlanum. Fyrst búðu tey uppi á Heygnum mikla, so hjá mostrini, Borghild – Várdís, á Gamla hospitali og so til endans bygdi Hjalmar hús í Niels Finsens gøtu 59. Ólavur hevur um hetta mundið verið 15 – 16 ára gamal. Aftur var tað kórljómurin, sum lá frammarlaga í sinninum, og legði gamli Hjalmar Hátún lunnar undir kór, sum fekk navnið Frøi. Nógv ung av bygd sungu við hesum kóri, og taldi kórið onkuntíð eini 70 - 80 fólk. Frøi hevði sína bestu tíð frá 1948 til 1952. Kórið fór t. d. út á bygd at syngja og einum sinni sang kórið í Sandavági, og her fekk Ólavur sín "elddóp" sum kórleiðari. Her royndi hann seg á fyrsta sinni at stjórna kóri, og stóð alt í einum roka í hansara sinni. At vita sær, at nógv fólk vóru fyri framman og ein hópur fyri aftan, sum eygleiddu hann við opnum eygum, var sjón fyri eygað og ljómur fyri oyrað. Ja, tað sum eygað ikki hevur sæð, og oyrað ikki hoyrt, rørir ikki hjartað. Hesin kórljómur hevur logað uppvið líka til dagin í dag. Hetta hevur verið honum til mikla tign og miklan sóma, og okkum øðrum til gagns.

Tá ið Ólavur 1947 fór at ganga á VBV á studenta – og præliminerskeiðinum, lá hetta aftur í sinninum, at fáa fólk at syngja. Alex Sólstein gekk eisini á hesum skúla, og fingu teir báðir í lag eitt kór, sum Erik Petersen stjórnaði. Erik bar seg undan í fyrstuni, men eftir eina formaning frá Thomas Nygaard, gav Erik seg undir hesa áheitan og sungið varð.

Tað er nógv at fara um, tá ið komið verður at tinnuni og lýsa mannin, kórleiðaran, Ólav Hátún, og allan henda líðilanga veg hann